# Rán á alljósum degi




*Arsenal-spælararnir høvdu sjálvandi alla orsøk at fegnast, men tað mundu vera tey flestu, sum ásannaðu, at sigurin var alt annað enn uppiborin*

*Mynd: Reuters*

**Arsenal fór avstað við FA-Cup steypinum fyri nøsini á Manchester United, sum annars átti finaludystin við húð og hár. Arsenal-leikararnir megnaðu tó at halda høvdið kalt undir brotssparkskappingini, har Paul Scholes gjørdist syndabukkurin**

FA-CUP
*Stefan í Skorini*

Arsenal gjørdist fyrsta felagið 133 ára longu søguni hjá FA-Cup, ið vinnur steypið eftir brotssparkskapping. Hetta hendi leygardagin, tá arvafíggindarnir United og Arsenal brustu saman á Millenium Stadium í Cardiff.

Eftir vanliga leiktíð og umdyst hevði hvørki av liðunum fingið bóltin í kassan, og tí skuldi dysturin avgerast frá ellivu-metra blettinum. Allir Arsenal leikararnir skoraðu, men Paul Scholes var tann einasti hjá United, sum ikki skoraði. Jens Lehmann tveitti seg til røttu síðuna, bjargaði og avgjørdi harvið óbeinleiðis FA-Cup finaluna 2005.

## Rán

Yvirskriftin til greinina sipar til, at Arsenal als ikki hevði uppiborið hendan sigurin, men at teir rændu sigurin fyri nøsini á United, sum stýrdi dystinum frá byrjan til enda.

Trupulleikin hjá United var bara, at teir ikki skoraðu, og so mátti dysturin avgerast uppá brotsspark, og har var Arsenal stinnari.

Um hugt verður eftir hagtølunum fyri dystin, síggja vit eisini eina greiða mynd av gongdini. Sambært Optasportsdata hevði United tólv royndir, harav átta raktu innanfyri málrammuna. Arsenal hevði hinvegin fýra royndir, og bert ein teirra rakti málið.

Álopið hjá United hevði so at siga einki at bjóða uppá, og Roy Carrol í málinum hjá United var at kalla arbeiðsleysur stórar partar av dystinum.

Í fyrra hálvleiki fekk Rio Ferdinand kúluna innum málstrikuna, men hetta var av røttum kolldømt fyri rangstøðu.

Eftir steðgin brast bólturin tvær ferðir á træverkið aftanfyri Jens Lehmann í Arsenal-málinum. Fyrru ferð var tað Wayne Rooney, sum royndi seg úr spískum. Lehmann væntaði eitt innlegg úr høgru og tók tí eitt fet út úr málinum, men hann fekk í evstu løtu jústa bóltin á stongina. Ein sera frek roynd frá Rooney, sum tó ikki gav úrslit.

Seinnu ferð var tað Nistelrooy, ið var sera nær við at leggja United á odda. Eftir hornaspark setti hann høvdið á bóltin, men sviin Frederik Ljungberg stóð á strikuni og sendi bóltin við høvdinum umvegis tvørtræið út aftur í spælið.

## Beiskur biti av svølgja

Undan finaluni høvdu bæði Sir Alex Ferguson og Arsene Wenger úttalað seg um mótpartin. Og sum vant tá hesir báðir skulu geva sína meining til kennar, spældi tað ikki stillisliga av.

Tí mundi tað vera ein beiskur biti hjá Ferguson, tá tapið gjørdist veruleiki. Hann rósti sínum leikarum eftir dystin fyri eitt gott avrik, og hann metti, at hansara menn høvdu uppiborið sigurin við tí álopsfótbólti, sum United vísti. Trupulleikin var bara, at kanónin hjá Nistelrooy, Rooney og Ronaldo ikki var innstillað hendan dagin, og tað mátti United eisini kenna sviðan av.

Ferguson langaði eftir dystin út eftir Arsenal, og kallaði avrikið hjá mótstøðuliðnum "keðiligt". Eisini vildi hann vera við, at Vieira skuldi fingið reyða kortið móti endanum av dystinum, men at franski miðvallarin eftir øllum at døma var "immunur" yvirfyri kortum dómarans.

Tað vóru ikki mong, ið mettu, at Arsenal hevði uppiborði sigurin, men Ashley Cole, vinstri bakkur hjá Arsenal, hevði eina aðra meting av dystinum. Hann var ikki í iva um, at hansara lið hevði uppiborið at standa ovast á sigurspallinum eftir dystin.

Cole vísti á, at Arsenal arbeiddi hart gjøgnum allan dystin, og at teir ongantíð góvu skarvin yvir, hóast United legði hart trýst á Arsenal-verjuna. Men spurningurin er, um ikki Cole skal siga júst hatta eftir ein slíkan dyst.

## Málturkur hjá United

Júst hesin dysturin var eisini sera symptomatiskur fyri kappingarárið hjá United. Liðið endaði á triðja plássið aftanfyri bæði Arsenal og Chelsea. Hetta merkir, at United skal spæla kvalifikatión til Champions League.

Tað hevur sostatt ikki gingið eftir vild hjá United, og nú glapp FA-Cup finalan eisini teimum av hondum.

Hyggja vit eftir hagtølunum, eru tað fimtan ár síðani, at United skoraði so fá mál í landskappingini sum í ár. Bert 58 mál megnaðu United-leikararnir at skjóta í Premier League. Hetta bendir á, at liðið hevur trupulleikar í álopinum, og tað var eisini eyðsýnt leygardagin. Hóast gott álopsspæl vildi bólturin ikki inn, og tað kostaði sigurin at enda.

At álopsspælið ikki riggaði hjá Arsenal sunnudagin var kanska ikki so løgið. Toppskjúttin í Onglandi í ár, Thierry Henry, sat nevniliga uttanfyri við skaða, og fekk tí ikki sett sín dám á dystin. Um hann var við, hevði Arsenal helst ikki spælt við einum so verjukendum útgangsstøði. Bergkamp formáddi sær nevnliga ikki stórvegis móti verjuni hjá United, og tað var sjáldan, at vit sóu nakað til álopsdygdirnar hjá Reyes, Pires og Ljungberg.

Besti maður hjá Arsenal var ikki óvæntað málverjin Jens Lehmann, sum fleiri ferðir bjargaði Arsenal undan undirgangi. Framtíð hansara er tó framvegis ivasom, tá hann ikki hevur verið nóg stabilur gjøgnum kappingarárið. So møguliga var hetta síðsti dystur hjá týska málverjanum, men hann endaði við einum braki og kann vera errin av sínum seinasta avriki fyri felagið.